## Boripallur til Disko

Skotska oljufelagið Cairn hevur stórar ætlanir, nú tað fyrireikar seg royndarboringar við Diskoi í Grønlandi í summar. Felagið hevur gjørt avtalu um at leiga boriskipið Stena Forth at bora í juni, men nú hevur felagið boðað frá, at tað eisini fer at senda ein boripall hagar. Talan er um boripallin Stena Don, og ætlanin er, at skipið og pallurin skulu bora í tíðarskeiðinum frá juni til oktober, sigur grønlendska kringvarpið KNR. Cairn hevur fingið loyvi at leita eftir olju vestan fyri Disko.



## Doyði av kulda

Tað hevur verið sera kalt í Noregi í seinastuni, og nú hevur kuldin eftir øllum at døma kravt sítt fyrsta mannalív. Aftenposten skrivar, at ein 40 ára gamal maður varð funnin deyður á einari gøtu í býnum Sarpsborg í gjár, og at hann eftir øllum at døma er deyður av kulda. Eitt blað í Sarpsborg skrivar, at maðurin var júst komin heim eftir eitt longri tíðarskeið uttanlands. Tað frysti næstan 20 stig í Sarpsborg gjáranáttina, og løgreglan sigur, at maðurin var ikki serliga væl ílatin.

# Statoil ger milliardaíløgu á landgrunninum

**Norska oljufelagið fer saman við danska Dong og eysturríkska OMV at bora ein brunn í loyvi 008 helst í 2011**

ÁTTANDI BRUNNURIN
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*




*Loyvi 008 á føroyskum øki, har Statoil, DONG og OMV fara at bora. Rosebank loyvið sæst hinumegin markið, har somu feløg saman við Chevron hava funnið olju og nú verður arbeitt fram ímóti at framleiða olju.*



*Rúni M. Hansen, stjóri í Statoil sær Føroyar sum eitt áhugavert leitiøki í framtíðini eisini*

*Mynd Jan Müller*



*Johan Dahl, landsstýrismaður í oljumálum fegnast um avgerðina hjá Statoil, Dong og OMV at bora ein brunn*

Tann mundi vera tann best hugsandi nýggjársgávan, sum varð latin Føroyum, tá Statoil, Dong og OMV buðu seg fram til at bora ein brunn tætt uppat einum stórum oljufundi beint hinumegin markið. Hetta verður sostatt tann áttandi brunnurin á føroyska landgrunninum. Tann sjeyndi verður boraður í mai av ENI.

Í tíðindaskrivi frá Vinnumálaráðnum verður sagt, at Johan Dahl, landsstýrismaður, hevur góðkent, at oljuleitingarloyvi 008 verður longt.

Sum partur av treytunum fyri at loyvið verður longt, hava loyvishavararnir átikið sær at bora ein leitibrunn á økinum.

Loyvið 008 varð latið í 2005 í øðrum útbjóðingarumfari. Loyvishavarar eru Statoil, ið er fyristøðufelag, Dong Føroyar og OMV.

### Hugaligt

Johan Dahl, landsstýrismaður, sigur í viðmerking, at tað er sera hugaligt fyri oljuleiting í føroyskum øki, at loyvishavarar aftur átaka sær at bora ein leitibrunn.

– Vit eru sannførd um, at føroyska økið hevur ótroyttar møguleikar. Men vit eru samstundis greið yvir, at fíggjarkreppan eisini hevur sína ávirkan á arbeiðsumstøðurnar hjá oljufeløgum, og at lakara fíggjarorkan er avmarkandi fyri virksemi teirra. Á hesum grundarlagi er tað enn størri orsøk til at fegnast um hesa avtalu, ið eg vóni verður til gagns fyri Føroya land og fyri loyvishavararnar.

Saman við brunninum, ið ENI, Cieco og Føroya Kolvetni fara at bora í vár, hava vit nú tveir brunnar fyri framman. Hetta kunnu vit vera væl nøgd við og staðfesta jaligu tilgongdina í oljuleiting á føroyskum øki sigur oljumálaráðharrin.

Loyvið verður longt til 2014 ella 2015, alt eftir hvør arbeiðsskrá verður vald at útinna.

### Trúgva uppá Føroyar

Rúni M. Hansen, stjóri í Statoil segði við ÚF í gjár, at Statoil sjálvandi kennir váðan at fara undir slíka stóra íløgu, men felagið hevði tikið á seg slíka íløgu saman við øðrum feløgum, um tey ikki mettu møguleikan vera til steðar at finna olju og gass í føroysku undirgrundini.

Hann helt tað eisini vera gott fyri oljuleiting við Føroyar, at altjóða oljufeløg vilja binda seg til at bora brunnar, tí tað er einasti máti at finna út av, um kolvetni eru í undirgrundini.

Herfyri úttalaði varforsetin fyri aljtóða oljuleiting hjá Statoil seg til Sosialin og segði, at Statoil hevði gjørt av at bora í minsta lagi ein brunn inni á tí føroyska basaltinum. Hetta er ikki tann brunnurin, sum felagið nú hevur bundið seg til. Hetta er ein annar brunnur, sum antin verður boraður á einum av hinum fimm loyvunum hjá felagnum og sum liggur nærri Føroyum og helst norðari.

Sum skilst eru samráðingar millum oljufeløgini og Jarðfeingi um longjan av teimum ymsu loyvunum. Og eftir øllum at døma koma hesar samráðingar at avgera, hvar og møguliga nær enn ein Statoilbrunnur verður boraður.

### Tvær milliardir fyri tríggjar brunnar

Samanumtikið merkir alt hetta, at tað í 2010, 2011 og møguliga 2012 fara at verða boraðir tríggir brunnar við Føroyar. Sagt við øðrum tølum, ein samlað íløga uppá einar tvær milliardir kr. taka vit seismiskar og aðrar kanningar við.

Tað, sum er serstakliga áhugavert við loyvi 008 og tí brunni Statoil hevur bundið seg til at bora har, er tann sannroynd, at bert fáar fjórðingar frá boristaðnum er gjørt eitt risastórt oljuog gassfund í bretskum øki, kallað Rosebank/Lochnagar. Tað skilst á oljufólki í Aberdeen, at avgerðin um at byggja hetta feltið út er meira ella minni tikin. Og hugsa vit um møguleikan fyri, at somu oljuløg finnast okkara megin markið eisini, so er væl ikki óhugsandi, at Statoil og hini feløgini, sum longu eru við í Rosebank meta møguleikan góðan fyri at finna líknandi oljugoymslur í loyvi 008 eisini.

# Mærsk spennir seg út við føroyskum loyvi



*Mærsk Olie og Gas væntar sær nógv burtur úr loyvinum, sum felagið hevur keypt meginpartin av frá Faroe Petroleum*
*Mynd: Scanpix*

**Herfyri keypti danska Mærsk Olie og Gas meginpartin av einum loyvi frá Faroe Petroleum, og felagið væntar sær nógv burturúr**

OLJULEITING
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Loyvið, sum Mærsk Olie og Gas keypti meginpartin av frá Faroe Petroleum, er í tí norska partinum av Norðsjónum.

– Vit síggja stórar møguleikar í hesum loyvinum, sjálvt um tað her sum aðrastaðni er váðar, sigur norski stjórin í Mærsk Olie og Gas, Åke Hesselblom, við Børsen.

Við keypinum fekk Mærsk Olie og Gas 70 prosent av loyvinum PL431 og fekk samstundis leiklutin sum operatørur á økinum, sum eitur T-Rex. Við keypinum bindur felagið seg til at bora næsta ár, og stjórin vónar at fáa eit gott úrslit burturúr. Hann vil ikki siga, hvat felagið rindaði Faroe Petroleum fyri partin.

Mærsk Olie og Gas hevur nú 12 loyvir í tí norska partinum av Norðsjónum, og felagið er eisini virkið í tí danska og tí bretska partinum. Felagið hevur eisini loyvi í bretskum øki stutt frá føroyska markinum.